# Harmast um trygdartiltøkini



Umframt íløguna í nýggja Smyril er samferðsluhavnin á Drelnesi størsta einstaka íløgan á samferðsluøkinum í komandi fíggjarlógaruppskoti

Mynd: Edvard Joensen

**Landsverkfrøðingurin harmast mest um, at kontoin, sum æt trygdartiltøk og størri ábøtur, ikki er á komandi fíggjarlóg**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Landsverkfrøðingurin hevur mist kontoina, sum var til at taka, tá gerast skuldu ábøtur og trygdartiltøk á landsvegunum. Tað harmast Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, um.

Oyvindur Brimnes hevur ikki tær stóru viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið, tí hann hevur ikki nærlisið tað enn, sigur hann við Sosialin.

Hann sigur tó, at stovnurin fær umleið tað sama í pengum, tá tær báðar havnargerðirnar á Drelnesi og á Syðradali verða hildnar upp í móti tí, sum skarvað verður av í vegagerðini.

Hinvegin røkka tær seks milliónirnar til nýgerð av vegum ikki til nógv annað enn avrigging av arbeiðum, sum eru í gongd. Og einki av teimum verður endaliga liðugt kortini, sigur landsverkfrøðingurin. Talan er um trý vegastrekki og ein tunnil.

Tríggjar milliónir eru settar av til Gásadalstunnilin. Tað er tó ikki nóg mikið at gera tunnilin lidnan fyri, sigur landsverkfrøðingurin.

Hann sigur, at við teimum pengunum kann tað gerast koyrandi til Gásadals, men tað verður ikki fyri almennari ferðslu. Kanska okkurt undantaksloyvi til ein postbil, og møguliga onkran, sum býr í Dalinum. Men almenna ferðslan má enn sum fyrr um fjallið, tí tunnilin kann ikki latast upp, fyrr enn hann er heilt liðugur. Soleiðis eru nú reglurnar fyri nýggjar tunlar, vísir landsverkfrøðingurin á.

Tann kontoin undir nýgerð av landsvegum, sum æt »Trygdartiltøk, størri ábøtur og at taka til«, er strikað í fíggjarlógaruppskotinum, sum Karsten Hansen legði fram mánadagin. Hon var á seinastu fíggjarlóg tríggjar miliónir krónur. Men hon kundi væl havt verið størri, tí brúk er alla tíðina fyri henni, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Hann harmast serliga um, at hon er burtur, tí hon varð nýtt til íløgur og ábøtur á støðum, sum ofta vóru vandamikil hjá fólki at ferðast á. Eitt nú støðum, har nógv fólk gekk yvir um vegir, ella til ger av busslummum, sigur hann. Hetta er nú burtur, og sostatt verða tey trygdartiltøkini færri.

Ymisk arbeiði, sum eru í gongd, verða ávirkað av nýggja fíggjarlógaruppskotinum. Eitt nú tryggingin og nútíðargerðin av tunlunum. Arbeitt verður hetta árið út fyri teir, pengar, sum eru tøkir. Men har, sum komið verður til á nýggjárinum, verða so tunlarnir standandi. Kanska onkur á hálvum gekki. Uttan ljós ella útsúgving og tað, sum nú verður kravt.

Eitt arbeiði, sum hevur verið í gongd eina tíð, er vegagerðin um Gøtueiði. Har verður liðugt í ár, sigur landsverkfrøðingurin. Í hvussu er so væl, at koyrandi verður eftir nýggja vegnum. Men ivaleyst verður okkurt eftir at hampa fram við vegnum og sovorðið, men tað fer so at bíða, til pengar fáast til tað, sigur hann.

# Vágbingar vóna enn

**Hóast einki oyra er sett av á fíggjarlógaruppskotinum til havnargerð í Vági, hevur borgarstjórin ikki mist vónina um, at tað fer at koma. Tí tað er jú lógarfest, vísir hann á**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Borgarstjórin í Vági hevur ikki mist vónina um, at Vágs havn verður útbygd, hóast landsstýrismaðurin við vinnumálum sigur, at pengarnir eru fluttir til skúlabygging í Vági.

– Tað hevur als einki við hvørt annað at gera, vísir Jógvan Krosslá, borgarstjóri, á. Bæði málini eru lógarfest. Miðnámsskúlin er eitt landsmál, og havnina hevur Løgtingið eisini samtykt at gera, so har man fara at koma ein loysn, sum vit kunnu góðtaka, hevur hann álit á.

Hann sigur seg havi skilt, at átta milliónir vóru ávegis til Vágs havn, men at tær síðan vórðu tiknar aftur. At tær skulu vera farnar til skúlabygging, ljóðar í hansara oyrum eitt sindur løgið, heldur borgarstjórin.

Hann setir sítt álit á, at Løgtingið fer at taka undir við uppskotinum hjá Henriki Old og Johan Dahl, soleiðis at havnin kann verða bygd út.

– Tað er ikki Vágs Býráð, sum hevur biðið um samferðsluhavn her suðuri. Tað er komið aðrastaðni frá, vísir Jógvan Krosslá á. Men saman við samferðsluhavnini má ídnaðarhavnin eisini gerast, sigur hann.

Hann sigur, at bæði tingmenn og landsstýrismenn hava alla tíðina verið positivir, tá vágbingar hava tosað um havnarútbygging. Ikki minst, tá teir fyri stuttum vitjaðu í Suðuroy. Tí væntar hann ikki, at málið fer at steðga upp nú.

Men at blanda havn og skúla saman, vil hann ikki góðtaka. Nú er skúlamálið so mikið gaamalt, at tað skal loysast, uttan at tað gongur út yvir nakað annað virksemi í kommununi, sigur borgarstjórin í Vági.



Hóast einki er sett av í fíggjarlógaruppskotinum til havnarútbygging í Vági, hevur borgarstjórin álit á, at tað man fara at koma kortini



Hermann Oskarsson um fíggjarlógaruppskotið:

# Krøvini geva útslag

**– Góða búskaparliga gongdin merkir eisini økt krøv frá fólki í Føroyum, og hetta sæst aftur í fíggjarlógaruppskotinum, sigur Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur**

FÍGGJARLÓGIN
*Heri á Rógvi*



*– Tað hevði verið ófør t, um vit dugdu at halda eitt sindur aftur í teimum bestu tíðunum, og kanska løgdu nógv fyri í ringum tíðum, men vit menniskju seta nú einaferð stór krøv, og tað eru hesi krøvini, ið vit eisini mugu gjalda fyri, sigur Hermann Oskarsson*

Mynd: Heri á Rógvi

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 er júst vorðið almannakunngjørt, og sum vant hevur hetta set gongd á orðaskifti og fleiri ósemjur eru longu stungnar upp, áðrenn uppskotið er viðgjørt á tingið.

Sosialurin ringdi í hesum sambandi við Hermann Oskarsson. Hann er búskaparfrøðingur, stjóri á Hagstovu Føroya og formaður fyri Búskaparráðið.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 er ikki nakað, ið loypir hvøkk á Hermann. Rokna vit rentur og avdrøg sum vanligur útreiðslu, so kemur fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 eitt »lítið« yvirskot – um tvær milliónir.

– Tað, sum veruliga er hent, er, at vit hava skorið ríkisveitingina niður, sigur Hermann Oskarsson.

Ríkisveitingin varð av seinastu samgongu skerd við góðum 366 milliónum, og núverandi samgongu hevur gjørt av, at ríkisveitingin skal fastfrystast, soleiðis at hon minkar í virði ár fyri ár.

– Vit kunnu siga, at yvirskotið er lítið í ár í hesum uppgangstíðum, men vit hava havt yvirskot millum 400 og 600 mió undanfarin ár. Samstundis eru krøvini hjá okkum stór. Vit velja eisini politikarar eftir, hvat teir lova, sigur Hermann.

Hann heldur ikki, at høvdu vit ikki skorið tær 366 mió. av, so stóðu 366 milliónir á niðastu linju í fíggjarlógini.

– Vóru 366 milliónir aftur, og høvdu teir nokk lagt seg eftir at nýtt hesar pengarnar eisini, sigur Hermann.

Hann ávarar eisini ímóti, at vit gerast alt ov bangin, um ikki øll tøl ovurstórt yvirskot.

– Hall á almennum kassum er ikki nakað óvanligt. Mann má rokna við, at tað kann enda við halli á handilsjavnanum og øðrum, sigur Hermann Oskarsson.

## Fáa tað, vit velja

Formaðurin í Búskaparráðnum er av teirri sannføring, at størri búskaparlig framstig verða gjørd, tess størri krøv seta fólk.

– Ein máti at síggja tað upp á, sum er hent í Føroyum, er, at vit hava havt góðar tíðir, og landskassin hevur havt stór avlop. So er trýstið at gera íløgur og nýggjar tænastur er stórt. Fólk vilja barnagarðar, at samferðslan er í lagi osfr. Hetta sæst eisini týðulig, m.a. í atburðinum hjá politikarunum, sum varða av teimum ymsu økjunum, ið hava tørv á størri íløgum og fleiri tænastum, sigur Hermann Oskarsson.

– Eg vildi tí mett tað sum eina natúrliga gongd, at tá vit hava havt góðar tíðir, og tað slakar eitt sindur av, so merkir hetta ikki, at krøvini hjá fólki slaka av, sigur Hermann.

Ùtfrá hesum sigur Hermann, at fíggjarlógaruppskotið ikki er nakað yvirraskilsi fyri seg.

Spurdur, um tað ikki hevur størstan týdning, at vit halda eitt sindur aftur í hesum ógvuliga góðum tíðum, og ístaðin gera størri íløgur, tá búskapurin hevur brúk fyri at hitast eitt sindur upp, sigur Hermann, at tað kann metast sum eitt ynski, men vit mugu ásanna, hvussu menniskju eru.

– Tað hevði verið óført, um vit dugdu at halda eitt sindur aftur í teimum bestu tíðunum, og kanska løgdu nógv fyri í ringum tíðum, men vit menniskju seta nú einaferð stór krøv, og tað eru hesi krøvini, ið vit eisini mugu gjalda fyri, sigur Hermann Oskarsson.

Tá er hetta er sagt, so heldur Hermann, at vit spjaða íløgur fyri fleiri ár, tí tær stóru íløgurnar, Suðuroyarferjan og Landssjúkrahúsið mugu gjaldast nú og kunnu ikki bíða.

Sjálvur sigur Hermann, at hann er sera fegin um, at tað nú verða gjørdar íløgur í tað sosiala økið.

– Hesar íløgur vilja fáa fleirfaldaðar aftur, sigur Hermann.

## Væl fyri

Nú fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 er lagt fram, so er hetta ikki nakað, ið fær Hermann Oskarsson til at ivast í, at føroyski búskapurin er væl fyri.

Tað slakar av í løtuni, men talan er ikki um nakra minking. Í alla mína tíð hevur føroyski búskapurin ikki verið so væl fyri, sum hann er nú, sigur Hermann Oskarsson.

At blokkurin er fastfrystur roknar Hermann heldur ikki við fær tað stóru ávirkan á føroyska búskapinum næstu fýra árini.

# Skattalættin er treytin

**– Tað skal ein skattalætti til fyri, at eg skal geva mítt samtykki til fíggjarlógina, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður. Hann letur annars væl at játtanini til sítt egna ráð, sum hann heldur, at teir eiga og skulu klára at halda**

FÍGGJARLÓGIN
*Heri á Rógvi*



*Jørgen Niclasen er nøgdur við sín part av køkuni í fíggjarlógaruppskotinum, men hann leggur dent á, at hann heldur vil hava skattalætti heldur enn hægri útreiðslur*

Játtanin til fiskivinnuna á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 er 174,5 mió. Hetta er á leið tað sama sum í 2002. Afturat teimum 174,5 milliónunum hevur fiskivinnan fingið tvær milliónir til íløgur í 2003. Tað er Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, og hansara Fiskimálaráð, sum skulu umsita hesar pengar. Fiskimálaráðið hevur fingið játtan til tær meirútreiðslur í sambandi við prísvøkstur og øktar lønarútreiðslur, sum allar eru lógarbundnar.

– Eg haldi, at tað er í lagi, at vit liggja á stórt sæð somu játtan sum í ár. Tað eiga vit og skulu vit klára, sigur Jørgen Niclasen.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at teir internt í Fiskimálaráðnum hava

– Eg kundi hugsað mær, at vit hildu fastari við útreiðslurnar, og ikki hækkaðu útreiðslunar, sum mann hevur gjørt í hesum fíggjarlógaruppskotinum, sigur Jørgen Niclasen.

## Skattalættin

Jørgen Niclasen ger heilt greitt, at fyri hann og Fólkaflokkinum er skattalættin ein treyt. Ætlaði skattalættin byggir á eina undirskrivaða avtalu í samgonguni, og hetta slepst ikki uttanum, sigur Jørgen. Á nýggjárinum skal ætlaði skattalætinn byrja at virka.

– Skattalættin fer at merkja 115 mió. kr fyri landskassan yvir tvey ár. Barnafrádrátturin skal hækkast og fyri øll skal skattastigið lækkast.

– Tað skal ein skattalætti til fyri, at eg skal geva mítt samtykki til fíggjarlógina. Talan er um eina undirskrivaða avtalu millum flokkarnar, og vit hava fingið at vita ferð eftir ferð frá Karsten Hansen, at skattalættin er innroknaður í inntøkurnar í fíggjarlógini , sigur Jørgen Niclasen.

Hjá Jørgen og Fólkaflokkinum kundi tað ikki verið meiri einfalt – skattalættin skal koma 1. januar 2003, og tað er ein ófrávíkilig treyt.